Uppskot til semju millum

**Føroya Reiðarafelag** øðrumegin

og

**Føroya Fiskimannafelag,**
**Maskinmeistarafelagið** og
**Føroya Skipara- og Navigatørfelag** hinumegin

Í felagsreglum verða gjørdar hesar broytingar:

### § 2. Mynstring, avboð, uppsøgn og burturvísing

Nýggj § 2, stk. 2b verður orðað soleiðis:

"Um útmynstrað verður í tíðarskeiðinum 27. desember til og við 1. januar, verður útgoldið, fyri hesar dagar, ein daglig viðbót, pr. mann, sum er helvtin av minstuløn sambært lóg um Trygdargrunn Fiskivinnunar."

### § 8. Arbeiðsklæðir

§ 8, stk. 3 verður orðað soleiðis:

"Har sum arbeiðsklæðir ikki verða latin manning ókeypis, verða latin teimum, sum sigla fast við sama skipi/reiðarí, eitt **hálv**árligt endurgjald fyri arbeiðsklæðir á kr. 1.250,00."

### § 17. Frádráttir

Í skjali 1 verður har tað stendur "4,70" broytt til "4,90", og har tað stendur "3,95" broytt til "4,10".

### § 20. Søluvirði

Nýggj § 20, stk. 6 verður orðað soleiðis:

"Tá ið fiskað verður av felags- ella eginkvotu hjá skipum í øðrum skipabólki, skal samlaða søluvirðið koma til avrokning. Um eingin manning er á skipinum við atgongd til kvotuna, verður avrokningin einans gjørd fyri manningina á fiskandi skipinum og tá av øllum søluvirðinum."

### § 22. Tryggingar

Í § 22, stk. 14 verður "kr. 45,00" broytt til "kr. 50,00".

Nýggj § 22, stk. 16, sum kemur í gildi 1. august 2020, verður orðað soleiðis:
"Reiðarin hevur skyldu at tekna eina lívs- og bráðsjúkutrygging hjá føroyskum tryggingarfelag fyri skipara og manning á sínum skipum. Tryggingin skal í minsta lagi svara til eina lívstrygging uppá 500.000 krónur, bráðsjúkutrygging uppá 100.000 krónur og bráðsjúkutrygging hjá børnum uppá 60.000 krónur."

**§ 34. Gildi sáttmálans**

Hesin sáttmáli hevur gildi frá 1. apríl 2020 at rokna. Sáttmálin kann uppsigast við 2 mánaða freist til ein 1. apríl, tó í fyrsta lagi 1. apríl 2022.

**Protokolat**

Vísandi til § 17, stk. 2 eru landingarútreiðslur loyvdur frádráttur í øllum bólkum.

Ásannandi at ávís ógreiða hevur verið í sambandi við frádrátt fyri landingarútreiðslur, eru partarnir samdir um í sáttmálaskeiðnum at fáa greiðu á teimum spurningum, sum máttu verðið í sambandi við hesar frádráttir, og í undirskjali at nágreina, hvørjar landingarútreiðslur eru at rokna sum loyvdir frádráttir.

Tórshavn hin 30. mai 2020

**Vegna**
**Føroya Skipara- og Navigatørfelag**

*Annfinnur Garðalíð*
Formaður

*Elias Zachariasen*
Næstformaður

**Vegna**
**Føroya Reiðarafelag**

*Hanus Hansen*
Formaður

*Stefan í Skorini*
stjóri

**Vegna**
**Maskinmeistarafelagið**

*Ólavur Gunnarsson*

**Vegna**
**Føroya Fiskimannafelag**

*Jan Højgaard*

Formaður

*Regin Olsen*
Næstformaður

Formaður

*Sámal Poulsen*
Næstformaður